gult10 cyan10 magenta10 svart10



## FISKIVINNUTÍÐINDI

# Dent á hagreiðing

Fiskivinnuráðið fekk uppskotið um nýggjan fiskivinnupolitikk hjá landsstýrinum til ummælis, áðrenn tað var lagt fyri tingið og ráðið hevur nakrar viðmerkingar til uppskotið.

Einki verður nevnt um, at dentur eigur at vera lagdur á, at fiskur skal hagreiðast soleiðis, at tað til eina og hvørja tíð skal kunna fáast sum mest burturúr. Hetta eigur at verða ein partur av stevnumiðinum fyri fiskivunnupolitikkin, sigur Fiskivinnuráðið.

Fiskivinnuráðið heldur, at tilfarið sum fiskimálaráðharrin hevur lagt úr hondum signaliserar stabilitet, soleiðis at skilja, at ikki er lagt upp til kollveltandi broytingar í fiskivinnupolitikkinum. Fiskivinnuráðið metir, at tilfarið er eitt gott yvirlit yvir reglur og viðurskifti í fiskivinnuni. Men ráðið fýlist á at tað kann vera eitt sindur trupult at finna greiðu á, hvat eru galdandi reglur og hvat eru sjónarmið hjá fiskimálaráðharranum.

# Vaksa um virðisøkingina

– Ein av størstu avbjóðingunum hjá føroyskari fiskivinnu tey komandi árini er at vaksa um virðisøkingina, t.e. at fáa meiri burturúr somu nøgd. Nýskapan og evni at tillaga seg broytiligar umstøður er ein fyritreyt fyri at varðveita og menna kappingarføri á marknaðunum. Dentur eigur tí at leggjast á at menna førleikastigið, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

Fiskimálastýrið fer tí tey komandi árini at leggja seg eftir at bøta um karmarnar fyri gransking og menning innan fiskivinnuna. Hetta skal fara fram í tøttum samstarvi við vinnuna. Tað skal fyrst og fremst vera vinnan sjálv, sum tekur stig til verkætlanir, grundað á egnan tørv.

Ein liður í hesum er at leggja eina miðvísa ætlan fyri nýtslu av tí peningi, ið verður játtaður á fíggjarlógini til fiskivinnugransking- og menning. Peningurin eigur í størri mun enn higartil at verða marknaður til ymisk øki, sum granskarar og vinnan meta vera tey mest áhugaverdu at satsa uppá. Samstarv og samskipan eru fyritreytirnar fyri at røkka málinum um gransking og menning, sum ein liður í at fáa virðisøking í vinnuni.

Fiskivinnan er fjøltáttað, og tað eru nógv ymiskt viðurskifti, ið hava týdning fyri, hvussu leikur fer í vinnuni. Granskingar- og menningarvirksemi eigur tí at fevna um øll lið og allar tættir í vinnuni, tvs. livandi tilfeingið í sjónum og umhvørvið tess, fiskiveiði, fiskiídnað, marknað og onnur viðurskifti í sambandi við fiskivinnu.

# Ringur rækjuprísur

Føroysku rækjuskipini á Flemmish Cap fáa sera vánaliga prís fyri rækjurnar í løtuni. Prísurin hevur ikki verið so lágur seinastu 25 árini, skrivar Fiskimannablaðið.

FF blaðið hevur frætt frá Artic Viking. Teir fáa umleið 10 tons um dagin. Slagið er smátt.

Eisini er ísur ein trupulleiki í løtuni, ikki hjá skipunum á Flemmish Cap, men tá tey skulu inn í New Foundlandi. Sólborg skuldi inn her fyri, teimum vantaði 50 tons í last. Men við land var ísurin upp til fýra metur tjúkkur, so har var einki annað at gera enn at fara út aftur og fiska uppí.

# Útskifting og nýíløgur í fiskiflotan

Landsstýrið heldur ikki, at útskifting og íløgur í fiskiflotan eiga at føra við sær størri veiðutrýst. Landsstýrið heldur eisini, at avgerandi fyri nýíløgur er, at raksturin í longdini er lønandi. Í álitinum hjá fiskimálaráðharranum um framtíðar fiskivinnupolitikkin stendur millum annað hetta um nýíløgur:

Miðalaldurin á fiskiførum er í flestu skipabólkum rættiliga høgur. Tørvur er tí á útskifting og nýíløgum í flotanum. Hetta hevur samanhang við fiskiførum sum ein liður í matvøruframleiðslu, men ikki minst við fysiskar arbeiðsumstøður og trivnað umborð, sum aftur hevur týdning fyri kappingarstøðuna hjá flotanum á arbeiðsmarknaðinum.

Avgerandi fyritreytin fyri nýíløgum í heimaflotanum er, at raksturin í longdini er lønandi. Leikluturin hjá tí almenna í hesum høpi er ikki at veita beinleiðis stuðul til nýíløgur. Tað almenna eigur ístaðin at leggja høvuðsdentin á at umsita fiskatilfeingið, at býta veiðimøguleikar og at laga lógarkarmarnar hjá vinnuni á ein hátt, sum í størst møguligan mun ger tað møguligt hjá vinnuni at hava lønsaman rakstur, uttan studning ella onnur beinleiðis almenn inntriv.

Ein liður í at bøta um møguleikarnar fyri nýíløgum og útskifting er at gera møguleikarnar fyri keyp og sølu av fiskirættindum rúmari. Ein slík skipan kann gera, at teir ið sleppa úr vinnuni fáa pening, sum eftirverandi vinna skal gjalda. Tí eigur at umhugsast, at vinningur av sølu av veiðiloyvum skal setast í egnan íløgugrunn, sum innan ávíst tíðarskeið skal brúkast til endurnýggjan av fiskiflotanum. Um ikki, verður avgjald lagt á. Hetta kann gera, at søla av veiðiloyvum kann vera við til at endurnýggja flotan ella, at sølan eisini kemur samfelagnum til góðar, tí avgjaldið fer í landskassan.

Hóast ein slík skipan kanska ikki í fyrsta umfari førir við sær kostnaðareffektiviseringar, eitt nú tí at høgir prísir á veiðitólum og fiskirættindum kann gera raksturin dýrari, so verður roknað við, at skipanin sum frálíður fer at gera, at vinnan kastar somikið av sær, at størri avlop er til nýíløgur.

Ein onnur uppgáva hjá myndugleikunum er at síggja til, at útskiftingin ikki førir við sær størri fiskiorku í flotanum. Hetta er serliga umráðandi í stýringini á føroysku landleiðunum, har grundvøllurin í fiskidagaskipanini er fiskiorkað og veiðievnini hjá fiskiførum og skipabólkum. Til tess at tryggja, at fiskidagaskipanin skal tæna sínum lívfrøðiliga og búskaparliga endamáli, er neyðugt at hava tamarhald á samlaðu fiskiorkuni.

# Íslendska fiskivinnan hevur fíggjarligar tupulleikar

Norska blaðið Fiskaren skrivar í seinastu viku um kreppuna í íslendsku fiskivinnuni. Hóast øktan umsetning er eginognin hjá nógvum feløgum minka munandi og skuldin er økt, stendur at lesa á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum

Fyri tíðina eru aðalfundir í stóru íslendsku fiskivinnufyritøkunum, sum flest allar eru skrásettar á íslendska partabrævamarknaðinum. Roknskapirnir vísa, at eginognin hjá fleiri av feløgunum er munandi minka og skuldin er økt 15-25% seinasta árið. Hetta hevur síðani havt við sær, at virðini á partabrøvunum eru follin 36 % seinastu 12 mánaðirnar.

Fiskivinnufyritøkurnar hava seinasta ár økt umsetning við 23% í mun til 1999. Eisini rakstrarúrslitini eru betri, men tó ikki nóg góð í mun til umsetningin. Stóru tapini koma fram í rokniskapunum, tá hugt verður eftir úrslitinum eftir fíggjarligar kostnaðir. Feløgini skylda stórar upphæddir, sum eru fíggjaðar við ólagaligum treytum.

Seinnu árini hevur íslendsk fiskivinna broytt struktur, soleiðis at aktørarnir í vinnuni alsamt eru vornir størri og kvoturnar eru savnaðar á alt færri hondum. Hesin politikkur er valdur við tí fyri eyga at gera vinnuna meira lønandi. Orsøkirnar til fíggjarligu gongdina verður frá vinnuni met at liggja í høgu oljuprísunum, lágu prísunum á mjøl og olju og niðurgongd í fiskiskapinum og prísfall á rækjum.

Tað verður ikki met, at spádómarnir hjá íslendsku fiskifrøðingum um vøkstur í fiskiskapinum ikki hava hildi og at tað er orsøkin til inntøkumiss hjá fiskivinnufeløgunum, sjálvt um veruleikin nokk er tann, at týdningarmiklastu fiskastovnarnir sjálvdan ella ongantíð hava verið so niðurfiskaðir sum teir eru í dag.

Tað verður heldur ikki tosað um, at vinnan hevur sera stóra skuld, sum tyngir raksturin nógv, at eginkapitalurin er viknaður og at flestu fyritøkurnar koyra við tapi. Virði á íslendsku krónuni fall nógv í fjør og fyri fiskivinnufyritøkurnar merkir hetta nógv, tí tey skilda nógvan pening í fremmandum valuta. At íslendska kr. er minkað í virði ger at skuldin er økt.

# Trygd á sjónum og fiskiveiðieftirlit

Fiskimálastýrið er farið undir fyrireikingar at seta í verk eina fylgisveinaskipan at nýta í sambandi við trygd og eftirlit á sjónum á føroysku landleiðunum. Hetta er eisini ein liður í at fáa eina tilbúgvingarætlan upp at standa í sambandi við kolvetnisvirksemi í føroyskum sjóøki.

Gongdin seinastu árini hevur verið, at føroysk skip, ið fiska aðrastaðni, eru komin undir fylgisveinaeftirlit. Føroysk rækjuskip, sum fiska á Flemish Cap, hava verið undir eini skipan við støðugum fráboðanum um fylgisvein í nøkur ár.

Í 1999 kom í gildi fyriskipan innan fyri NEAFC, har kravt verður, at øll skip, sum fiska í NEAFC sjóøki, skulu vera undir eftirliti um fylgisvein. Eisini eru, ella verða, avtalur gjørdar við onnur lond (Noreg, ES og Russland), har føroysk skip koma undir eftirlit um fylgisvein, tá fiskað verður í teirra sjógvi.

Í NAFO-økinum er álagt rækjuskipum at hava eygleiðarar umborð. Fiskimálastýrið miðar eftir at fáa greiðari reglur um eygleiðarar, eitt nú um samsýningar og kostnaðir, og hvussu skipanin skal fíggjast. Talan kann eisini verða um at lata privatum hesa skipan at røkja.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Músafellan

**Flottur pallur, góð ljós- og ljóðgóðska og framúrskarandi góðir sjónleikarar, var alt við til at gera tann spennandi leikin hjá Agathu Christie fantastiska undirhaldandi**

SJÓNLEIKUR

*Annika Bech og Gerhard Mikkelsen*





Tað er sjónleikarabólkurin Spírar sum framførur sjónleikin Músafellan.

Spírar varð sett á stovn á vári í fjør, og hetta er so teirra fyrsti sjónleikur. Ikki kann sigast annað enn, at leikurin er eydnaður sera væl.

Tað fyrsta ein legði til merkis, tá ið ein setti føtur sínar innum gáttina í sjónleikarahúsinum, var dámrin. Í gongini stóðu menn í fátæksligum klæðum og líktust rættiligum gøtudreingjum, sum ein sær í filmum. Teir stóðu har og seldu avísir. Tað riggaði sera væl. Ein gjørdist longu tá klárur yvir, at her lá eitt stórt og hart arbeiði fyri aftan.

Tá ið ein so kom inn í salin, gjørdist ein við tað sama varðin við tann flotta pallin, og tónleikurin í bakgrundini, fekk ein at føla tað, sum um ein var farin aftur í tíð, og var endaður í 50'unum.

Brádliga gjørdist alt myrkt inni í salinum, og eitt skríggj boraði seg inn í okkum, so hárini reistu seg. Kenslan av, at ein sjálvur var partur í søguni, gjørdist sera sterk. Óhugnin legði seg sum ein tungur mjørki yvir okkum.




Tað ið sjónleikurin snýr seg um er, at ein kona er vorðin myrd í heimi sínum í London, og at politiið ikki veit hvør ið hevur gjørt tað. Men teir hava funnið eitt lítið lummahefti, og har í stendur ein adressa. Nevniliga Hotel Monkswell Manor. Á hotellinum eru komin nógv fólk, og til ber at leggja øll undir illgrunan til morðið. Hesi fólkini hava ógvuliga ólíkar persónligheitir, og tað førir ofta til sera festligar hendingar. Í sjónleikinum møta vit eigarunum av Monkswell Manor - parið Giles og Mollie Ralston (Gutti Winther og Beinta J. Danielsen), tí lívliga Christopher Wren (Ronni Poulsen), tí álvarsomu Frøkun Caswell (Hanna Flóvinsdóttur), einum útlendingi nevndur Harra Paravicini (Aksel Joensen), tí heldur snerputu Frú Boyle(Sólva Jónsdóttur), Metcalf Majori (Hilmar Joensen og tí heldur álvarsama kriminalassistentinum (Eyðfinnur Steensen). Løgreglan meinar, at drápsmaðurin ætlar sær tann vegin, tí har er hansara næsta offur.

Ígjøgnum allan leikin situr ein við einari óvitandi kenslu. Spenningurin veksur alsamt, og ikki ber til at rokna út hvør ið drápsmaðurin er, líka upptil teir síðstu minuttirnir.

Ein veit ikki um ein skal flenna ella gráta. Í tí einu løtuni situr ein og býtur negl av berum spenningi, og brádliga situr ein og heldur um búkin og flennur. Spælararnir dugdu ótrúliga væl at fáa alt til at virka so veruligt og livandi.

Leikstjórarnir Jákup Weihe og Gunnvá Zachariasen hava gjørt ein sera góðan og væl gjøgnumførdan leik. Ein leikur sum vit ráða øllum at fara og uppliva


## MASKINMEISTARAÚTBÚGVING

*tín møguleiki - títt val*

**Byrjað verður 6. august 2001**



Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta hægri yrkisútbúgving sum fáast kann yvirhøvur í Føroyum, og tí gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og landi, umframt eisini oljuvinnuni, har maskinmeistarar t.d. er størsti yrkisbólkur.

Útbúgvingin tekur 3 ár, men tað er eisini møguligt at gevast eftir próvtøku fyrsta árið, og gevur hesin eitt ára lesnaður ávís rættindi sum maskinistur.

Hevur tú hug at gerast maskinmeistari, so skalt tú seta teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesnaðin saman við umsóknarblaðnum. **Síðsta freist at søkja er 1. juni 2001**

**MASKINMEISTARASKÚLIN**
Undir krákugjógv 5, FO-100 Tórshavn,
tlf. 312661, fax 318545
E-mail: mms@mec.fo, Heimasíða: www.mec.fo



Leygardagin 21. apríl settu vit av misgáum eina gamla lýsing hjá Maskinmeistaraskúlanum í blaðið.

Vit biðja Maskinmeistaraskúlanum umbera okkum.

**Sosialurin**



# Eysturoyingar & Norðstreymoyingar

**IRF byrjar við øktari skiljing í Eysturoynni og Norðstreymoynni. Vanliga ruski í húsarhaldinum skal býtast í tríggjar posar.**

**Tann grái posin,**
skal brúkast til ruski, sum skal brennast.
Posin verður heintaður hvørja viku.

**Tann hvíti posin,**
skal brúkast til pappír og papp.
Posin verður heintaður fimtu hvørja viku.
Lýst verður í fjølmiðlunum.

**Tann grøni posin,**
skal brúkast til serliga dálkandi burturkast.
Posin verður heintaður tvær ferðir um árið.
Lýst verður í fjølmiðlunum.

IRF